

# Oljulóggávan ein katastrofa

– Verður oljulóggávan samtykt í tí líki, hon er løgd fram, so verður hon ein katastrofa, sigur Páll Vang, býráðsformaður á Tvøroyri. Hann heldur, at tað skal standa í lógini, at allar veitingar til oljuøkið skulu fara um føroyskan keikant, og allur fólkaflutningur skal um føroyska havn, tyrlupall ella floghavn.

INGI RASMUSSEN

Páll Vang heldur tað hava alstóran týdning, at tað verður staðfest longu í rammulógini fyri kolvetnisvirksemi, at øll sløg av veitingum til boripallarnar fara um føroyskan keikant, umframt at allur flutningur av fólkum skal umvegis føroyska havn, tyrlupall ella floghavn.

Hann er sannførdur um at verða hasar treytirnar ikki settar longu í lógini, so fara føroyingar einki at merkja til eina oljuvinnu á landi.

– Um tað ikki verður nevnt beinleiðis í lógini, so verður einki grundarlag fyri at gera íløgur í nakað sum helst, sum byggir á oljuvinnuna, sigur Páll.

Hann heldur, at um ikki oljufeløgini fáa hesar treytirnar settar, tá tey fáa loyvi at royna seg, so fara tey bara at halda seg til tær tænastur, tey eru von at nýta, haðani tey fáa tær í dag.

– Tey vilja helst bara gera tað, tey eru von við, sigur Páll Vang.

## Veitingar um føroyska kei

Tvøroyrar kommuna er millum teirra, sum ætla sær at vera við, um ferð kemur á eina oljuvinnur í Føroyum. Men Páll trýr ikki, at føroyingar eru sinnaðir at gera íløgur, um teir ikki fáa trygd fyri, at føroysku havnirnar verða nýttar.

– Tað er avgjørt neyðugt, at tað kemur í lógina, soleiðis at allir partar síggja, at alt skal um føroyskan keikant, sigur Páll Vang.

Stendur einki um hetta í lógini, so fara allar veitingarnar at koma frá eitt nú Aberdeen, Hetlandi og Stavanger, heldur Páll, og so kemur ikki eitt føroyskt arbeiðspláss burturúr.

– Føroysk farmskip fáa einki at gera, havnirnar fáa ongar inntøkur og vinnulívið í Føroyum fær ongar umvælingar og líknandi, sigur Páll.

Og hann er sannførdur um, at tað einki grundarlag er fyri einari føroyskari frálandavinnu, verður hetta ikki staðfest longu í lógini.

Tað snýr seg bæði um alt tað, sum skal út á oljuøkið og tað, sum skal innaftur.

– Kemur alt um føroyskan keikant, so hava føroysk virki møguleika at bjóða uppá umvælingar og tænastur annars, og so er grundarlag fyri at gera íløgur.

Tað ber eisini væl til at brúka umhvørvið sum orsøk fyri at seta tílíkar treytir til oljufeløgini.

Páll heldur, at ein góð grundgeving fyri at seta hesar treytirnar er, at tað soleiðis ber til at hava eftirlit við at burturkastið kemur innaftur og ikki verður koyrt út á sjógv.

## Fólkaflutningur

Eins stóran týdning hevur tað, at allur fólkaflutningur fer um føroyska havn, tyrlupallar ella flogvøll.

– Annars verður bara flogið beinleiðis úr eitt nú Hetlandi beint út á boripallin, sigur Páll Vang.

Hann er sannførdur um, at um fólkaflutningurin ikki er við í avtaluni, so er ivasamt, um eitt nú matstovur, gistingarhús og hýruvognsførarar fáa nakað burturúr.

Um hetta kravið verður sett, ber eisini føroyingum til at hava tal á, hvussu nógv fólk eru í føroyskum øki. Hetta er neyðugt av trygdarávum, so vit vita hvussu nógv fólk eru á boripallunum. Men á henda hátt ber eisini til at hava eftirlit við skattgjaldarunum.

Tá útlendingar stíga á land í Føroyum verða teir skrásettir, og skulu so gjalda skatt í Føroyum.

– Hatta eru tey týdningarmestu økini í oljulóggávuni – alt hitt, sum stendur har, er eitt valaarbeiði við nógvum sjálvfylgjum, sigur Páll Vang.

## Ikki landsstýrið

Ætlanin við lógini er, at tað skal vera landsstýrið, sum setir hesar treytirnar, tá bjóðað verður út, og síðani kunnar løgtingið um treytirnar, sum er settar.

Men hetta heldur Páll Vang ikki vera rætt.

– Sæst tað longu í lógini, so fáa ikki bara útlendingar, men eisini føroyingar, sum kundu hugsað sær at gjørt íløgur í virki knýtt at oljuvinnuni, at vita, at tað er eitt krav, sigur Páll.

Stendur tað til ein landsstýrismann at avgera, hvørjar treytir skulu setast við, kunnu vit ikki vera vís í, at tað verður øllum føroyingum at frama, heldur Páll Vang.

– So veldst tað um, um tað er ein sterkur ella ein veikur ráðharri, sum situr við oljumálum, og er hann veikur, so er hann lættur at dragsa runt í maneguni av oljufeløgunum, sigur Páll Vang.

Páll Vang hevur tosað við oljufeløg í Danmark, Onglandi og Noregi, og tey halda einki løgið verða í tí at seta slíkar treytir.



**Páll Vang, býráðsformaður á Tvøroyri, heldur ikki, at lógin um kolvetnisvirksemi er nóg greitt orðað**

# Kvinnurnar meint raktar av arbeiðsloysi

Seinastu arbeiðsloysistølini frá Hagstovuni boða frá minkandi arbeiðsloysi í Føroyum. Talið av arbeiðstøkum í ALS minkar støðugt, meðan talið á teimum sum fáa veiting frá Almannastovuni vegna arbeiðsloysi veksur.

ELI GUTTESEN

Tann 3. oktober í ár vóru 1.209 persónar tøkir hjá ALS, meðan 555 persónar persónar fingu stuðul frá almannastovuni vegna arbeiðsloysi. Samanlagt er talan um 1.764 persónar.

Men hóast 1.209 persónar vóru tøkir, vóru tað bert 1.112 sum fingu útgjald. Summi av hesum hava havt arbeiðsinntøku í tíðarskeiðnum, meðan tey hava verið skrásett og verður hædd tikið fyri hesum, er bert talan um 977 fulltíðararbeisleys í ALS. Hetta er 5% av mettu arbeiðsstyrkini, sum í juni í ár var mett at vera um 20.500 fólk.

## Myndin vend

Tá kreppan av álvara slóg ígjøgnum í Føroyum var arbeiðsloysislutfallið størri hjá monnum enn hjá kvinnum. Men síðan tá er myndin vend á høvdið. Nú er bert ein triðingur menn meðan tveir triðingar eru kvinnur.

Hetta skyldast helst at tá kreppan byrjaði vóru tað vinnugreinir við nógvum mannfólkum í arbeiði, sum vóru serliga meint raktar. Hóast arbeiðsloysið síðan tá er minkað fyri allar aldursbólkar bæði hjá kvinnum og monnum, tykist tað sum eldru kvinnurnar millum 45 og 66 er ringast fyri í arbeiðsloysistølunum. Arbeiðsloysi í hesum bólki er 8% av kvinnunum í hesum aldursbólki.

## 16 kommunur fríar fyri arbeiðsleysar menn

Bert í fýra kommunum var eingin arbeiðsleysur tann 3. oktober í ár. Hesar vóru Saksunnar-, Fugloyar-, Bíggjar- og Mykinesar kommuna. Umframt hesar hevði Sínoyar kommuna onga arbeiðsleysa kvinnu.

Meðan tilsamans fimm kommunur onga arbeiðsleysa kvinnu høvdu, vóru heili 16 av tilsamans 50 kommunum, har eingir menn vóru arbeiðsleysir.

Við einum arbeiðsloysi upp á 12,6% í mun til fólkatalið í aldrinum 16-66 ár er Sumbiar kommuna ringast fyri til arbeiðsloysi. Aðrar smáar kommunur eru eisini lutfalsliga illa fyri, men av tí at fólkatalið í kommununum er lítið gevur talið av arbeiðsleysum lutfalsliga stórt útslag.

Í Fuglafjarðar kommunu vóru 91 persónar arbeiðsleysir tann 3. oktober í ár, svarandi til eitt arbeiðsloysisprosent upp á 10. Talan var um 17 menn og heili 74 kvinnur. Sum dømi um aðrar kommunur við arbeiðsloysi omanfyri 5% har munurin millum arbeiðsleysar kvinnur og menn var stórur, kann nevnast Eiðis-, Miðvágs- og Skála kommuna. Í hesum kommunum var talið á arbeiðsleysum kvinnum og monnum ávikavist 22 - 4, 25 - 6 og 24 - 9.

## Suðuroyingar enn illa fyri

Verða tey arbeiðstøku býtt eftir landspørtum, sæst at sunnara helvt á Suðuroynni enn er illa fyri. Hóast arbeiðsloysið er hálvera úr 18% fyri tveimum árum síðan niður í 9% í oktober í ár, er hesin parturin av landinum meira enn tvífalt so illa fyri sum alt landið undir einum.

Sandoyggin, sum fyri tveimum árum síðan hevði eitt arbeiðsloysi upp á 16%, er nú komin niður á 4%, sum eisini er miðal fyri alt landið. Bara Streymoyggin og Norðoyggjar hava lægri arbeiðsloysi enn Sandoyggin.



## Arbeiðsloysið hjá monnum bert 2,7%

Tann 1. desembur í fjør búðu 27.425 fólk í aldrinum 16 - 66 ár í Føroyum. Talan var um 12.790 kvinnur og 14.635 kvinnur. Tann 3. oktober í ár vóru tilsamans 1.209 av hesum skrásett sum arbeiðstøk hjá ALS. Her eru øll viðroknaði antin tey fáa útgjald ella ikki. Tey sum eru í ískoytiskipanini fyri fiskavirkir eru ikki íroknað. Heldur ikki tey sum eru farin út um ta avmarkaðu tíð, tey hava rætt til at standa í ALS.

Talan var um 813 menn og 396 kvinnur, sum vóru arbeiðstøk í oktober í ár. verður hetta sett í mun til talið á monnum og kvinnum í aldrinum 16-66 ár, fæst eitt arbeiðsloysisprosent upp á 6,4 hjá kvinnum og 2,7 hjá monnum. Miðalarbeiðsloysið fyri kvinnur og menn undir einum var 4,4%. Til samanberingar kann nevnast, at í oktober 1995 vóru 2.623 arbeiðsleys svarandi til 10% meðan í oktober í fjør var talið á arbeiðsleysum 1.605 svarandi til 6%.


